# Nýggj ferðaskrivstova í Vági

*Lynn Flog er navnið á nýggju ferðaskrivstovuni, sum latin er upp í Vági. Skrivstovan selur ferðaseðlar um allan heim umframt pakkaferðir og aðrar ferðir*



*Fyri umleið trimum vikum síðan læt Lydia Etscorn upp ferðaskrivstovuna Lynn Flog í Vági* *Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Vágur:** Suðringar sleppa nú undan at fara til Havnar at fáa persónliga tænastu í samband við ferðaseðlasølu. Ferðaskrivstovan Lynn Flog í Vági kann lata teimum somu tænastur, sum líknandi skrivstovur aðrastaðni gera.

Lydia Etscorn í Vági lat fyrr í mánaðinum upp ferðaskrivstovuna Lynn Flog, sum heldur til oman fyri vegin innanvert Skipasmiðjuna í Vági. Hetta er ferðaskrivstova á hædd við slíkar skrivstovu aðrastaðni í heimi. Her ber til at keypa flogferðaseðlar kring allan heim. Um ein sumbingur skal út at sigla og skal mynstra í Hong Kong, kann hann fara inn á skrivstovuna í Vági og fáa ferðaseðilin avgreiddan úr Sumba til Hong Kong.

Lydia Etscorn metir, at tað eigur at vera ein fyrimunur hjá suðringum at fáa persónliga avgreiðslu í Suðuroy heldur enn at skula avgreiðast gjøgnum telefon ella noyðast norður til Havnar.

Bara tað at sita andlit til andlits við tann, sum avgreiðir teg, gevur kundanum eina kenslu av at vera við og hava stýr á tí, sum hendir.

Hesar allarfyrstu dagarnar hevur tó verið neyðugt hjá Lydiu at fáa ferðaseðlarnar skrivaðar út í Havn ella í Vágum. Men hetta kemur nú heilt skjótt upp á pláss. Tá Lydia hevur verið á skeiði í Danmark at læra seg at nýta hesar skipaninar, fer hon sjálv at útskriva ferðaseðlarnar í Vági, so kundin fer avstað aftur við endaliga ferðaseðlinum í hondini.

Lydia Etscorn sigur, at hon hevur avalu við Atlantsflog um ferðaseðlasølu. Men hon selur tó ferðaseðlar fyri onnur flogfeløg, sum til dømis Maersk Air, eisini. Enn er tó eingin avtalað gjørd um skipsferðaseðlar, eitt nú við Smyril Line, sigur hon. Men hon vónar, at tað kann gerast eisini. Fyribils verður arbeitt eftir bíleggingarskipanini hjá Atlantasflog, sigur hon.

Lydia Etscorn sigur, at hon hevur verið uttanlands og leitað eftir hotellum, sum hon kann standa inni fyri at senda fólk til, um tey ynskja eina pakkaferð uttan fyri vanligu charterferðirnar. Men sjálvandi selur hon eisini charterferðirnar fyri stóru ferðafeløgini, sum vit vanliga kenna, sigur hon.

Hon sigur, at hon hevur valt eina serliga hotelketu, har hon aftur hevur valt tíggju hotel burturúr. Hetta eru fýrastjørnað hotel, sum veita bestu tænastu, tú yvirhøvur fært á hotelli, sigur Lydia.

Meginparturin er á Kanarisku Oyggjunum, sigur hon. Serliga er tað Lanzarote, hon hevur valt sær sum ferðamál. Tað er greitt, at hesar ferðirnar kosta eitt sindur meira enn tær vanligu charterferðirnar. Men so kann ein eisini vera heilt vísur í at fáa tað, ein hevur biðið um og goldið fyri, vísir hon á.

Lydia Etscorn sigur, at hon byggir ikki fyritøkuna beinleiðis upp á at selja »eksklusivar« ferðir. Men hon vil fegin til einahvørja tíð kunna bjóða tí einstaka kundanum, sum ynskir eina slíka, tann møguleikan.

Lydia Etscorne sigur, at skrivstovan er opin frá klokkan 10.00 fyrrapart til klokkan 16.00 seinnapart. Men um ringt verður til skrivstovuna uttan fyri avgreiðslutíð, verður stillað um. So hon er altíð at hitta, sigur hon.

## Um ferjuleguna á Toftum

EDVARD JOENSEN

Mikudagin var grein í Tíðindablaðnum Sosialinum, har viðurskiftini á ferjuleguni á Toftum vórðu umrødd. Tosað varð millum annað við Alfred Olsen, kommunuskrivara í Nes Kommunu.

Í næstseinasta brotinum í greinini varð sagt soleiðis:

*»Nes Kommuna arbeiðir við at loysa málið soleiðis, at trolbøtingin verður flutt inn í Oyrar, har gamla turkihúsið var. Har skal byggjast høll, so teir fáa verið undir takið, tá arbeitt verður, sigur Alfred Olsen.«*

Alfred Olsen, kommunuskrivari, hevur síðan gjørt vart við, at hetta brotið møguliga kann misskiljast, soleiðis at fólk halda, at Nes Kommuna longu er farin undir at gera slíka høll.

Tað, sum ætlanini er, sigur Alfred Olsen, er at fara undir projektering til at slætta økið inni í Oyrum, soleiðis, at bátarnir møguliga seinni kunnu fáa eina høll bygda.

Vónandi er møgulig misskiljing við hesum rættað.

SUÐRINGAR SUÐRINGAR SUÐRINGAR

Nýggj ferðaskrivstova hevur latið upp í Vági

Vit selja ferðaseðlar runt allan knøttin.
Atlantic Airways, SAS, Maersk
- eisini pakkaferðir.
Vit bjóða eina heildartænastu.

Ringið á tel. 373049 ella faxa á 373042
e-mail: LynnFlog@post.olivant.fo

Lynn-Flog-Travel
900 Vágur • Tel. 373049 • Fax 373042 • e-mail: LynnFlog@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820

## Framsýning í Vági

*Suðuroyar Sparikassi sýndi fram tekningar, sum komnar vóru inn í samband við navnakappingina til sparikistilin hjá sparikassanum*



**Vágur:** Suðuroyar Sparikassi lat mikudagin upp framsýning í Skálanum við Skálá við 100 tekningum, sum børn hava sent sparikassanum.

Hetta eru tekningar, sum børn hava sent sparikassanum í samband við navnakappingina, tá sparikistilin Oddi fekk navn.

Úr Suðuroyar Sparikassa verður sagt, at tá varð lovað børnunum, at tekningarnar fóru at verða vístar fram, so onnur sluppu at síggja tær. Og tað vórðu tær so nú. Framman undan hava tær verið vístar í Smiðjuni í Lítluvík í Havn.

Í Vági varð boðað frá í skúlanum, at framsýningin var, og børnini komu at síggja, hvat úrslitið gjørdist.

**ej**



# Lítli maður frá Fjallafonn

*Leygarkvøldið og sunnudagin verður cabarett í Sjónleikarhúsinum í Havn at heiðra skaldinum Hans Andreas Djurhuus*

*Áarstova í Havn. Her vuksu brøðurnir Hans Andreas og Janus Djurhuus upp. Húsini stóðu á lítla økinum oman fyri Hotel Djurhuus niðast á Áarvegnum*



EIRIKUR LINDENSKOV

Sjónleikarhúsið í Havn verður um vikuskiftið karmur um eina cabarett at heiðra skaldinum Hans Andreasi Djurhuus við sangi, sjónleiki og upplestri.

Tað er Hanus Kamban, sum hevur lagt cabarettina til rættis, og verða samstundis gjørdar upptøkur til Sjónvarp Føroya, sum í februar næsta ár fer at hava tríggjar sendingar um skaldið Hans Andreas Djurhuus, ið Hanus Kamban eisini fer at leggja til rættis.

– Vit kalla hetta eina cabarett, men hetta er í veruleikanum ein víðkað cabarett, har vit eisini hava sjónleik við, sigur Hanus Kamban.

### Gera vart við viðrið í skaldskapinum

– Vit fara á henda hátt at gera vart við viðrið í skaldskapinum hjá Hans Andreasi, sigur hann.

Skráin fyri cabarettina er drúgv, og er hon sett saman av nøkrum sum fólk kenna og slíkum, ið fólk ikki kenna.

– Vit hava fleiri sangir, sum fólk eru góð við, sum eitt nú »Eg saðlaði mær ein hvítan hest«, »Tá ið teir sóu landið…« eins og sjómansvísur sum »Kristin Háberg leingist« og »Pætur á Brekku«.

Umframt hetta hava vit eisini funnið fram yrkingar hjá Hans Andreasi, sum fólk als ikki kenna - sum Regin Dahl hevur sett løg til, sigur Hanus Kamban.

Hesar yrkingar er m. a. »Tístram« og »Kirkjan á Tanganum«, sum er ein hugtakandi sangur um kirkjuna í Nólsoy. Kona Hans Andreas, Petra, var úr Nólsoy og hevði Hans Andreas tískil nógv samband við Nólsoynna. Hanus Kamban sigur, at hesin sangur ikki er framførdur í Føroyum áður.

Nøkur av teimum, ið fara at syngja, eru Úlvur við Høgadalsá, Rúni Brattaberg, Eivør Pálsdóttir, Hans Iversen, Jóhanna av Steinum og Kristian Elisabeth Mørkøre. Jóannes Andreasen fer at spæla undir upp á klaver. Eivør Pálsdóttir fer eisini at syngja aftur við kontrabassspæli hjá Mikael Blak.

Fyri at vísa Hans Andreas sum leikskrivara, verður framførdur triðji partur av leikinum um Anniku úr Dímun, og er tað Eyðun Johannesen, sum hevur leikstjórnað. Leiklutin sum Annika hevur Marita Dalsgaard, sum júst hevur lokið prógv sum sjónleikari. Onnur, ið leika, eru Egi Dam, Sverri Egholm og Hans Tórgarð.

– Tað er stór kraft í hesum leikinum, har Annika setir seg upp í móti tíðini og valdinum, sigur Hanus Kamban.

Annika í Dímun varð druknað í stakki - og til hetta høvið hevur Súsanna Winther Poulsen seymað ein reyðan stakk til Maritu Dalsgaard.

### Gamla tjaldið endurskapt

Fyri at fáa lýst umhvørvið í Sjónleikarhúsinum í tjúgunum vóru ætlanir um at fáa gamla leiktjaldið, sum Kristin í Geil málaði, hongt uppaftur. Myndirnar á hesum tjaldi lýsa væl tíðina, men tjaldið var í so ringum standi, at tað kundi ikki heingjast uppaftur. Men ráð vóru fyri tí…

– Vit fingu Per á Hædd at fotografera tjaldið. Team 85 hevur viðgjørt tað á teldu, og seglvirkið í Klaksvík hevur so seymað eitt nýtt tjald, sum er eitt kopi av tí gamla tjaldinum, sigur Hansu Kamban.

Cabarettin um Hans Andreas verður bert sýnd tvær ferðir. Leygarkvøldið klokkan 20 og sunnudagin klokkan 16. Atgongumerki, sum kosta 140 kronur, fáast í Kunningarstovuni í Havn.

## Sjónvarpssendingar um Hans Andreas

EIRIKUR LINDENSKOV

Í februarmánaði fer sjónvarpið at vísa tríggjar sendingar um Hans Andreas Djurhuus. Tað er Hanus Kamban, sum leggur sendingarnar til rættis, og fara tær at lýsa Hans Andreas sum skald, hugsjónarmann, lærara, talara og mangt annað, sum eyðkendi Hans Andreas Djurhuus.

– Hans Andreas Djurhuus var ein meira savnandi persónur, enn bróðirin, Janus. Hann hugdi meira uttan um seg sjálvan, meðan Janus var meira egosentreraður. Hans Andreas var altíð biðin at tala, um onkur fundur var, og hann segði ongantíð nei, greiðir Hanus Kamban frá.

– Gingu skip burtur, so hendi tað seg meira enn so, at einkjurnar bóðu Hans Andreas ugga tær við eini yrking, og so gjørdi hann tað.

Hans Andreas hevur skrivað og yrkt nógv. Ein stórur partur er prentaður, men nógv tilfar liggur eisini eftir hann, sum ongantíð er prentað. Eisini er nógv tilfar, sum bara er prentað í bløðunum og tískil ikki so kent.

Hans Andreas Djurhuus varð føddur í Havn í 1883 og vaks upp í Áarstovu. Hann var lærari, og í hesum sambandi mest kendur sum lærari við Realskúlan í Havn frá 1919 til hann doyði í 1951. Men hann var eisini lærari í Klaksvík, í Sandavági, á Tvøroyri.



*Hans Andreas Djurhuus 1883–1951*

